# Winnie Cooper er vorðin vaksin

Danica McKellar vann dreingjahjørtu um allan heim í sjónvarpsrøðini Glaðu 60'ini, har hon var fitta vinkonan hjá høvuðspersóninum Kevin Arnold, Winnie Cooper. Nú eru hesir dreingir vorðnir menn, og sleppa nú at síggja eitt sindur meira av Danicu. Í nýggjastu útgávuni Stuff Magazine eru myndir av Danicu í næstan ongum klæðum. Hesar myndir vera somuleiðis at síggja í mannfólkablaðnum M!, ið kemur út hósdagin, og millum annað eisini hevur eitt ummæli av Gestir fløguni.

Vakra unga kvinnan er nú vorðin 31 ár..Hon hevur lisið støddfrøði á universtetinum, og sigst at vera sera gløgg. Eisini hevur hon fingist eitt sindur við sjónleikaryrkið og hevur m.a. havt leiklutir í West Wing og í NYPD Blue. Í seinastuni er hon eisini farin undir at leikstjórna.



So frek sær Danica McKellar út í Stuff Magazine



So fitt sá Danica McKellar út í leiklutinum sum Winnie Cooper



Outlandish undirhildu væl á G! Festivalinum

mynd: Ólavur Frederiksen

# Outlandish í FIFA 07

Fyrr í ár gjørdu Outlandish um seg á G!Festivalinum, men nú er greitt, at bólkurin í næstum fer at leita sær inn í stovuna hjá nógvum føroyskum børnum, unglingum og monnum, eins og stovur kring allan heim.

Í nýggjastu útgávuni av fótbóltspælinum FIFA, ið eitur FIFA '07 er lagið "Kom Igen" eitt av løgunum, ið er á ljóðsporinum, skrivar Ekstra Bladet. Spæli, ið kemur bæði til teldur og spælimaskinur sum PS2, PSP, XBOX og Game Cube, er sera vælumtókt, og eisini her heima verður tað spælt av nógvum. FIFA 07 er gjørt av EA Sports og verður at fáa í handlunum í september.



# Janet Jackson og nýggi sjeikurin hugna sær

Tað mundi verið endin á yrkisleiðini hjá Janet Jackson, tá hon í Super Bowl finaluni í fyrra árið vísti eina brósti. Men hetta forðar ikki lítlu systir Michael Jackson at lata seg úr. Nú verður tað tó einans gjørt við hús. Janet sigur við Vibe Magazine, at hennara nýggi sjeikur Jermaine Dupri, hevur latið ein nýggjan heim upp fyri hana. Eitt nú elskar hon, at lata seg úr, meðan hann hyggur. Tað kennist so gott, tí honum dámar hetta so væl. Eisini viðgongur hon, at parið bæði nýtur leikur í sovikamarinum og tekur ónærisligar filmar upp.

# Sean Connery kundi verið Manchester United leikari



Sean Connery segði í sínum ungu døgum, nei takk, til royndarvenjing í Manchester United. Hetta avdúkar Connery í samrøðu við filmblaðið Empire. Hann greiðir frá, at í sínum ungu døgum ferðaðist hann kring Bretland við einum leiki, og allastaðni spældu teir fótbólt fyri at stytta sær sum dagtímarnar. Tá leikurin varð settur upp í Manchester varð hann sera væl umtóktur, og tey vóru tí har í 3 mánaðir. Fólk frá Manchester United varnaðust gávurnar hjá unga skotanum, og bjóðaðu honum til royndarvenjingnar. Eftir samráð við vinfólk innan sjónleikarheimin, valdi Connery tó ikki at taka av, tí vandin fyri skaðum var so stórum í fótbóltsheiminum.